Hin berandi konstruktiónin í Føroysku tjóðini

Eitt essay um ein møguligan triðja veg. Triði partur.

ESSAY
Kim Simonsen

Tjóðarbygging á einum ikki-nationalistiskum lendi.

Skuldi eg komið fram við ærligum hugsjónum um støðuna hjá tjóðum í dag, nú heimssamfelagið, altjóðagering, modernitetur og ymiskir lívsformar eru ein royndur lutur, hevði eg ikki hildið leiðina aftur í fortíðina at finna eina tjóðskaparliga kjølfestu. Hetta við at brúka afturhvarvið av eini fólksligari eindarmentan. Eindarmentan føroyinga er helst ikki til longur. Skuldi nakar ivast um hetta er rætt, so er bert at líta at ungdómi okkara, framtíðarinnar føroyingum. Vit síggja tey á gøtunum um dagin, í býunum um kvøldið, í sjónvarpinum til eitt nú Prix Føroyar kappingar. Ein bólkur eru hipphopparar. M&M fans. Ganga í heimsins størstu buksum, húgvum og troyggjum tey svimja í. Einum bólki dámar boybands, popptónleik. Nøkrum dámar hard metal rock, onnur eru til death metal, speed metal og doom metal. Ein stórur bólkur spælir gospel og alt har ímillum. Hin einasta eindarmentanin er kanska hon, at øll hava eina fartelefon, har tey sms'a á føroyskum.

Um europeiska nationalstatin í dag

Habermas skrivaði í 1996 eina sera áhugaverda heimspekisgrein um nationalstatin og tjóðarbygging í dag, har globaliseringin er alstór, har vit týðuliga kunnu hóma ein heim, har nationalstaturin er um at hvørva. Habermas vísir á, at tjóðir eru ymiskar, har vanligar statstjóðir mentu seg í Norður- og Vesteuropa, har hesar mentu seg innan karmarnar av statsliga økinum. Aðrar tjóðir komu seinni til, sum Italia og Týskland. Her síggja vit eina menning, ið er eyðkend av tjóðarbygging og propaganda um tilvitsku um tjóðina og tað tjóðskaparliga. Munurin á hesum aktørum er, at fyrri bólkurin fór frá stati til tjóð, meðan hin fór frá tjóð til stat. Í fyrra statinum vóru tað løgfrøðingar, diplomatar, kongsvald og hernaðarvaldið, ið skaptu ræsur fyri einum skynsamum stati.

Í seinna statinum vóru tað høvundar, søgufrøðingar, lærd og intellektuell, ið skaptu tankan um mentaðu tjóðina. Hetta slag av tjóðarbygging hava vit sæð í Føroyum. Habermas tosar eisini um eina triðu rød av nationalstatum, serliga í Afrika og í Asiu, ið komu fram eftir at hjálondini tóku seg aftur eftir annan heimsbardaga. Í Eyst- og Suðureuropa síggja vit nýggjar nationalstatir, koma undan kavi, mangan undir stórum bardaga og harðskapi. Habermas vísir á tað problematiska við, at man í vanligari nationalistiskari tjóðarbygging brúkar og vísir til eitt kenslugrundarlag, ið vit skulu vera samd um, vera felags um, ið er okkara tjóðskaparligi samleiki. Hetta skrivað av einum manni, ið var noyddur inn í Hitlerjugend, gevur etos til argumentið. Nationalistisk tjóðarbygging er og verður kensluborin og irrationel, mangan modernitetsfiggindalig og vandamikil, tí henda leið er fødd úr romantiskum lendi. Habermas heldur, at hetta er óbrúkiligt í einum fleirmentaðum samfelag og í einum modernaðum samfelag. Her liggur kjarnin í mínum uppreistri, eg eri eisini loysingarmaður, men góðtaki sum Habermas undir ongum umstøðum nationalismuna.

Habermas sær nationalstatin sum útholaðan í dag, ið leiðir til at neyðugt er at útbyggja møguleikarnar hjá einum og hvørjum nationalstati í dag. Politiskt meinar Habermas, at vit eru í eini proses, har nationalstatirnir í dag í Europa og aðrastaðir eru um at smelta saman.

Hegel helt fyri, at øll søgulig tilbrigdi, ta løtuna tey eru fullgjørd, eru dømd til undirgang. Okkum nýtist ikki vera samd við Hegelsa søguheimspeki fyri at síggja, at nationalsturin var, tá hann kom fram, eitt sannførandi svar til eina avbjóðing, ið helt á at finna ein søguligan og funktionellan javning til sosiala samskipan av eindum, ið vóru áleiðis til at detta sundur. Tá eindarmentan føroyinga møtti ídnaðarstevnuni. Tá bygdarsamfelagið ikki var ment at

breyðføða og skapa eina mentunarliga kjølfestu í Føroyum, gjørdist samfelagið opið fyri trúðarrørslum og tjóðskaparrørsluni. Í dag møta vit somu avbjóðingum, har altjóðageringin av vinnu, samskifti og tøknifrøði møguliga skapa somu vistfrøðisligu og hernaðarligu vandamál.

Tjóðskap sum fáfongd

Tað eg haldi vera eitt vandamál enn í dag, er at vanlig tjóðskaparlig mentan og politikkur kann gera eitt fólk veikt, óttafull og fáa okkum at krógva okkum fyri sosialum mobiliteti, moderniteti og globaliseringini, tí vit mangan trilvandi halda á við at vilja dyrka okkum sjálvi, fortíðina og tjóðskaparliga tokutaluna, ið vit rópa tjóðskaparligur samleiki.

Mín kritikkur kann av mongum tykjast harður, men hann er borin av, at eg síggi veikleikar, har onnur vilja síggja og skapa samleika. Eg síggi tjóðskaparromantiskar søguligar og fagurfrøðisligar klicheir, har onnur vilja siga mær, at hetta er føroysk mentan í dag. Eg meini, at í føroyska tjódskaparliga lívsforminum er ein veikleiki, ið eg ikki bert vil avdúka. Eg vil eisini berjast fyri at seta fram valmøguleikar, men eisini vísa, at hin berandi konstruktiónin í føroysku mentanini krevur viðgerð og ábøtur.

Sjálvur standi eg á einum sentraleuropeiskum modernistiskum lendi. Tað er her frá eg havi mína kjølfestu, ið eg fult og fast trúgvi uppá er vegurin, um nakar, fram. Ikki dreymar um ein tjóðskap, ið eru gøddir úr einum lendi av fólkafundum og stórørligum romantiskum bønarmøtum. Við øðrum orðum, vit skulu berjast fyri at fáa loysing og fyri einari heilt nýggjari og ikki nationalistiskari tjóðarbygging. At júst modernitetur er tað øvugta av niðurarvaðari kognitivari nationalismu. So kunnu frøðingar vera ósamdir um tjóðskaparliga mentan er ein lívsformur, ein lívsstílur, eitt kognitivt mynstur, ein skaptur felagsskapur ella alt hetta í senn.

Í tí tjóðskaparglorifiserandi lyndinum liggur ein ormur, ið etur seg feitan, meðan persónurin uttan at vita tað svinnur inn. Eitt trøllasplintur hevur altíð verið í eygunum á nationalistinum, ið fær hesi at leita eftir rósi. Síggja hesi kritik ella kritikarar, øsa tey seg. Tjóðskaparligi føroyingurin er sum ein fáfongd teenage dama, hvørs sjálvsverd skal avgerðast av rósi. Fær hon ikki ein dagligan dosis av uppmerksamheit, fær hon anoreksi. Tað er hendan tragiska yvirfølsamheit, eg haldi vera veikleikatekin. Eitt sterkt fólk, eitt sterkt fólkaslag tolir kritik. Kritikkur er menning! Ikki oyðilegging!

Tjóðskaparligt nervasamanbrot

Veruleikin er helst hann, at okkum væntar sjálvsálit. Føroyingar eru skít fullir av undirlutakenslum. Tað er hesum smædni eg vil til lívs. Vit meina tað, vit eru líka so sterk sum onnur. Men skal man máta alt við einari tjóðskaparligari skjótilæru, reduserar man alt tað føroyska til nakað 1870araligt, musealt og veikt. Soleiðis er nationalisman okkara størsti figgindi. Ein falskur vinur, sum lokkar við felagsskapi, men lovar eina billet til ein intellektuellan blindan veg.

Føroyar er sum randaræki ein eftirbátur

Mangan troysta vit okkum við, at vit hava alt, duga alt og eru nærum heimsmeistarar á nógvum økjum, men aftur her er spegilsmyndin nakað skeiv. Føroyingar klára seg toluliga væl á nógvum økjum, men síggja vit eina størri mynd, so eru vit fáment og eit fjarskotið randaræki, tí er tað ringasta vit kunnu gera, bert at rósa okkum sjálvum fyri líkt og ólíkt. Júst sum fáment og fjarskotin skulu vit bróta alt mark fyri sjálvsálit og nýskapan. Rós og smikur ger bert veikan og leiðir til fáfongd. Góður kritikkur og rættar tulkingar av støðu okkara í heimssamfelaginum, av møguleikum og ævigum endurtulkingum kann leiða okkum framá. Sjálvandi eru Føroyar betri fyri enn t.d. Hetlandsoyggjarnar, men hin vegin nógv verri enn Isle of Man. Manbúgvar eru langt framman fyri okkum. 99,6 prosent av okkara útflutningi er enn, sum fyri 100 árum síðani fiskur. Føroyar gerðast ótrúliga veikar av júst hesum, helt figgjarmálaráðharrin á Man fyri.

Síðani 1998 hava tjóðveldisfólk og fólkaflokksfólk haft valdið. Í skjótt fimm ár hava tey einki gjørt við hetta. Tað er, sum um teir enn hava tosk og alilaks á heilanum. So er tað oljan, ið skal bjarga okkum. So kann politikarin Kristina Háfoss hava eini sjey útbúgvingar, hon hevur ikki eitt hugskot til at fáa Føroyar úr verandi støðu. Um so Vígdis og Norðurlandaráð eta pinnamat til tey fara av fold av ovuráti, og samstundis tosa um tað serliga Norðuratlantiska. Hesi kunnu lúgva okkum skítfull, meðan tey ferðast kring allar útjaðarar á Buisness Class, hetta hjálpir einki uppá tølini.

Modernitetur er mobilisering á øllum økjum. Okkara sentrala mentunarliga kreppa í Føroyum í dag er andsøgnin millum „tað siðbundna" og „tað modernaða". Kanska henda „kreppa" er positiv. Vit kunnu tó tosa um menningarkreppur og lemjandi kreppur. Kanska føroyska sjálvsvirðingin er nøkunlunda stabil, persónligheitin situr nøkunlunda føst, eins og sjálvsmyndin er við batna.

At stovnseta ein føroyskan stat og endurnýggja eina føroyska tjóðarbygging, er við Habermas ein onnur uppgáva, enn í 19. øld. Í dag hava vit ikki brúk fyri at hin berandi konstruktiónin í føroysku tjóðini skal vera ein tráan eftir eini eindarmentan, ella nationalistiska uniformering, ella at vit skapa tjóðskaparligar kitchmyndir, fyri at fremja eina hugmynd um at føroyingar hava sama lívsformin, sama samleika ella somu virði, hetta er ikki longur rætt. Fólk í Føroyum eru fjølbroytt, ættarliðini liva við ymsikum tíðarfatanum, men mest av øllum er bæði tíðarfatan og føroyska „rúmið" alsamt broytt av øktum samskiftismøguleikum, av moderniteti og av globaliseringhetta er uppgávan í dag, at skapa eina møguliga tjóðarbygging, ið tekur støði í broytingum, moderniteti, dynamikki, sum er í tráð við modernaða sosiologi og heimspeki. Bert á henda hátt er tað bæði gjørligt at menna føroysku tjóðina, t.v.s. at tað finst ein annar og triði vegur, millum konservatismu og nationalismu.

Hvør rindar í veruleikanum danska ríkisstuðulin til Norðuratlantisku hjálondini?

Hendan greinin hjá Jógvan Sundstein er skrivað fyri valið í 1998. Greinin byggir á nakrar kanningar, sum ein grønlendskur bólkur gjørdi, og sum Jógvan Sundstein heldur vera áhugaverdar.

Hóast nógv er broytt seinastu fimm árini, so heldur Jógvan Sundstein, at greinin framvegis er aktuell í sambandi við orðaskiftið nú

Í politiska orðaskiftinum í bæði Føroyum og Grønlandi verður danski ríkisstuðulin til hesi bæði londini nógv umrøddur. Bæði í Grønlandi og í Føroyum verður hann roknaður sum størsta forðingin fyri, at hesi londini kunnu og/ella vilja taka sjálvstýri. Ríkisstuðulin til Grønlands verður roknaður at vera smáar 3 mia. kr. og til Føroya er hann eina góða mia.

Vanlig mannahugsan hevur verið, at hesin stuðul er ein gáva frá danska ríkinum og harvið frá danska skattgjaldaranum til smáu tjóðirnar norðuri í Atlantshavi. Nú er kortini komið fram, at tað er ikki sannlíkt, at so er. Í Grønlandi er skipaður ein dokumentatiónsbólkur ISIT, sum hevur til endamáls at gera prióvkanningararbeiði viðvíkjandi hernaðar- og trygdarpolitikki í grønlendska umráðnum. Ein partur av hesum arbeiði er at kanna samanhangin millum danska NATO limaskapin og tilsvarandi donsku útreiðsluskyldur og donsku gjaldingarnar til Grønlands og Føroya.

Fyrst nøkur orð um sjálvan ríkisstuðulin.

Á síðu 20 í bóklinginum "Peningarensl millum Føroyar og Danmark" verður samlaði ríkisstuðulin til Føroya (tað stendur ikki hvat ár) uppgjørdur til 1.127 mió. kr. Tá er bæði blokkstuðul og aðrar danskar útreiðslur í Føroyum taldar við. Hernaðarútreiðslurnar eru upplýstar at vera 179 mió. kr. Haraftaru er kríggsskaðaendurgjald uppá 44 mió. roknað við. Hetta seinasta er ikki nakar ríkisstuðul, men ein pensión til danskar ríkisborgarar, sum teir eiga fyri tænastu undir krígnum á sameindari síðu. Hetta hava danir skyldu at rinda líkamikið um Føroyar eru innanfyri ella uttanfyri ríkisfelagsskapin.

Ríkisstuðulin hevur millum annað hesar avleiðingar:

Positivar:

1. Hann økir peningaumfarið og gevur øktan møguleika fyri útbyggjan av infrastrukturi og kann óbeinleiðis útvega kapital til vinnuútbygging.

2. Hann gevur møguleikar fyri øktari almennari tænastu, millum annað eisini til social- og útbúgvingar endamál.

Negativar:

1. Teir frammanfyri nevndu positivu avleiðingarnar eru bert fyribils og uppá stutt sikt. Sum frá líður kemur fremmandi peningurin at virka sum ein sjúkur svullur, um skal doyvast við uppaftur meira av sama slagi.

2.Eyka peningaríkiligheitin, sum stendst av studninginum hevur við sær nýtslu, sum ikki samsvarar við samfelagið annars.

3. Kappingarfarið, sum uppá heilt stutt sikt kann sýnast at fáa tað betur, versnar sum frá líður, og fær ikki fótað sær á náturligan hátt.

4. Ábyrgdarkenslan, bæði í privata og almenna sektorinum, tekur skaða. Sjálv fólkasálin verður sjúk, og um ikki broyting kemur í, kemur tjóðin ongatíð fyri seg, men gongur til grundar sum tjóð. Sjálvir klettarnir ganga ikki til grundar, og kanska kunnu nøkur fólk eisini í framtíðini búgva her, men føroyska tjóðin hvørvir.

Hvørjar eru so loysnirnar?

Sum nevnt hevur sjúklingurin ein svull. Antin má hann takast í einum ella eisini grøðast so líðandi.

Verður hann tikin í einum, og tað er besta loysnin, má heilivágur gevast eina tíð, meðan sjúklingurin kemur fyri seg og gerst frískur aftur. Hesin heilivágur eitur kapitalisering av ríkisstuðulinum.

Nógv hevur verið skrivað, eisini í áðurnevnda bóklingi "Peningarensl millum Føroyar og Danmark" um, hvussu ein kapitalisering verður gjørd og útroknað. Eisini verður diskuterað, um stuðulin heldur fram stutta ella langa tíð. Tá ið sambandsmenn argumentera fyri sambandi og ríkisfelagsskapi siga teir, at vit ikki kunnu klára okkum uttan ríkisstuðulin. Tað vil siga, at teir roknað við, at hann heldur fram í alla framtíð. Tá ið teir hinvegin argumentera ímóti kapitalisering siga teir, at vit vita ikki, hvussu leingi stuðulin heldur fram, kanska hann verður avtikin um nøkur fá ár. Bæði argumentini eru í øllum førum ikki rætt, og eru í strið við hvørt annað.

Ein kapitalisering av ríkisstuðulinum er ein spurningur um samráðing. Tíðarlongdin, rentan, inflatiónin v.m. er alt samalt nakað, sum skal takast hædd fyri, men úrslitið verður ein samráðingarloysn. Hendan samráðingarloysnin eigur at vera fingin longu við komandi samráðingar millum Føroyar og Danmark.

Ein kapitaliseringsloysn minkar um rentuútreiðslurnar hjá Landskassanum og/ella økir um rentuinntøkurnar. Búskapurin verður harvið festur á náturligt støði og meginparturin av negativu avleiðingunum av, at ríkisstuðulin verður avtikin, verður burturbeindur.

Um svullurin skal grøðast so líðandi krevur tað eisini eina samráðingarloysn. Men í hesum førinum verður talan um at minka ríksiveitingarnar ár um ár í eitt avtalað áramál. Hetta líkist mest eini avvenjing.

Í báðum førum eigur ein avtala um sjálvstýri at fylgja við og harvið eisini yvirtøka av øllum málsøkjum.

Í báðum førum verður sjúklingurin, skjótari ella spakuligari, frískur aftur. Hann verður arbeiðsførur og fer at framleiða meir. Av hesum fer hann eisini at klára at rinda allar sínar egnu útreiðslur og ikki lata onnur gjalda fyri seg.

Hvør rindar ríkisstuðulin?

Sum nevnt hevur ein grønlendskur bólkur ISIT gjørt kanningar um búskaparligu viðurskiftini millum Danmark og NATO/USA og millum Danmark og Grønland/Føroyar. Teir hava skrivað eitt fyribils álit um málið, og sigast má, at tað er rættiliga forvitnisligt, serliga sæð við grønlendskum eygum, men eisini sæð við føroyskum eygum.

Fyribils niðurstøðan hjá bólkinum er:

1. Nevnda kanning gevur orsøk til at kanna málið víðari.

2. Aftaná seinra heimsbardaga vildi danska stjórnin hava eitt ella annað endurgjald frá USA fyri teirra herstøðir í Grønlandi.

3. Avtalan millum USA og Danmark var ein donsk veiting til samlaðu verjuna hjá NATO.

4. Síðani seinra heimsbardaga og til í dag hevur Danmark borið munandi minni av NATO útreiðslunum enn lond, sum samanlíknast kann NATO.

5. Munurin í tí relativt minni parti hjá Danmark av útreiðslupartinum hjá NATO stavar sambært egnu kanningarnar hjá NATO frá, at Danmark rindar til Grønland og Føroyar.

6. Um útreiðslurnar hjá Danmark til Grønland og Føroyar verða taldar við útreiðslufordeilingsroknist ykkinum svarar danski útreiðsluparturin nøkulunda til tann norska fyri árini 1970-1984.

Her skal leggjast afturat, at aftaná 1984 rindar Danmark munandi minni enn Noreg, sjálvt um útreiðslurnar til Føroya og Grønlands verða roknaðar við. Moguliga hevur hetta tó eisini aðrar orsøkir.

ISIT staðfestir, at danska Hedtoft stjórnin í 1949 ynskti endurgjald frá USA fyri herstøðirnar í Grønlandi. Eriksen stjórnin, sum kom í 1950 ynskti ikki slíkt beinleiðis endurgjald, men vildi hava eina avtalu, sum umfataði bæði USA og NATO. Endurgjaldið til Danmarkar skuldi vera eitt minni felagsgjald til NATO. Á tann hátt gjørdist tað minni sjónligt.

Kanningin hevur víst, at Danmark rindar væl minni til felags hernaðarútreiðslurnar enn hini Nato londini, bæði tá ið samanlíknað verður við NATO sum heild og við europeisku NATO londini. Men serliga áhugaverd er samanlíkningin við Noreg. Fortreytirnar hjá hesum báðum londunum eru nøkulunda tær somu, men gjaldið hjá Danmark er væl minni. Um gjaldið hjá Danmark til Grønlands og Føroya verður lagt afturat NATO gjaldinum, svarar danska ískoyti rættiliga væl til tað norska fyri árini frá 1970 til 1984. Seinri er sum áður nevnt munurin størri. Danmark rindar lutfallsliga uppaftur minni enn Noreg, men tá kunnu møguliga eisini aðrar orsøkir vera til tað.

Ein NATO arbeiðsbólkur skrivar í 1988 um kostnaðarbyrðina hjá ymisku limalondunum m.a. hetta um Danmark sum orsøk til teirra lága gjald:"The financial costs in support of Greenland and the Faroe Islands constitute a considerable burden to Denmark".

Eisini Uffe Ellemann Jensen, fyrrverandi danski uttanríkisráðharrin, umrøður hesi viðurskiftini í bók síni "Din egen dag er kort" soleiðis: "Færøerne og Grønland var gode kort at have på hånden, når NATO-ministrene samledes i 80-erne. Når der skulle lappes på surheden over danske fodnoter, eller når de andre spurgte, hvordan det gik med at nå op på 3 % af nationalproduktet, som den tidligere statsminister Anker Jørgensen havde lovet i NATO, så kunne det give lidt pusterum når jeg fortalte, hvor vigtigt det var at have stabile forhold i Nordatlanten og Arktis, og hvor store beløb Danmark brugte på at sikre dette gennem vor økonomiske støtte til Færøerne og Grønland".

Aftaná kanningararbeiði og gjørdu samanlíkningarnar kemur ISIT til tað niðurstøðu, at Danmark fær í minsta lagi "avsláttur" frá NATO fyri tær upphæddir, sum Danmark rindar Føroyum og Grønlandi. Mælt verður síðani til fleiri kanningar fyri at koma til botns í hesum áhugaverda spurningi. Spennandi verður at frætta tá fleiri úrslit koma til sjóndar.

Danmark beinleiðis vinning av ríkisfelagsskapinum

Um nevndu kanningar eru eftirfarandi, og tað eru tær við rættiliga stórari vissu, so hevur Danmark beinleiðis búskaparligan fyrimun av at hava Grønland og Føroyar í ríkisfelagsskapinum. Danmark fær á "ósjónligan" hátt endurgoldið tær upphæddir, sum verða goldnar til Grønland og Føroyar. Sostatt er gjaldingin frá danska ríkinum ikki stuðul frá Danmark, men í veruleikanum frá NATO/USA.

Samstundis vil tað siga, at tá gjaldingarnar til Grønland og Føroyar einki kosta Danmark, fær Danmark stóran fyrimun av hesum somu gjaldingunum, tí stórur partur av teimum fara aftur til Danmarkar, soleiðis sum peningarenslið hevur verið í mong ár. Vónandi heldur grenjanin um, at danski skattaborgarin rindar so og so nógv til Føroyar nú uppat.

Hinvegin eru skaðaárinini á føroyska búskapinum av "ríkisstuðlinum" kortini líka stór. Tey broytast ikki av, hvør ið veruliga rindar upphæddirnar.

Vístar vera eisini ymiskar grafiskar talvur, sum sýna ymisk lutfall millum Danmark. Noreg og NATO í sambandi við gjaldingar til verjufelagsskapin.

Jógvan Sundstein